

Hallur, Brandur og Helena royna seg á liggjandi træi í Viðarlundini



*Rebekka kláraði at klintra rættiliga høgt upp*



*Tað er gott fyri matarhugin at spæla úti í frískari luft. Rasmus, Jákup, Guðrun og Guðrun hava sett seg at fáa sær at eta*

# Dagstovnur setir fokus á rørslu

BARNAANSING

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Dagstovnurin í Hoyvík hevur hevur júst skipað fyri einari temaviku, har tey hava havt rørslu sum evni. Nógv verður í dag tosað um, hvussu týdningarmikið tað er, at børn røra seg, og kanningar vísa, at rørsla ávirkar bæði menning og trivnað hjá børnum. Og starvsfólkini í Dagstovninum í Hoyvík valdu tí ikki bara at tosa um rørslu, men at nýta allar teir møguleikar, sum eru, hjá børnum at rokast og stuttleika sær í rørslu og livandi spæli.

Børnini á stovninum vórðu býtt í fýra aldursbólkar og fingu síðani uppgávur, sum passaðu til teirra. Tey klintraðu í trøunum í Viðarlundini, spældu rørsluspøl í Gundadali og Hoyvíkshøllini, vitjaðu spælipláss og sparkivallir og fóru túrar í hagan. Starvsfólkini lata væl at og halda, at hetta var ein sera góð og avbjóðandi vika bæði fyri børnini og starvsfólkini.